## Meitelberg søkti Brønshøj

Besta liðið hjá ÍF Føroyum, sum spælir í Københavnerserien, vann hóskvøldið heldur óvæntað á útivølli ímóti Brønshøjg. Úrslitið av dystinum gjørdist 2-0 til ÍF Føroyar, og Jørgen Meitelberg gjørdi bæði málini. Hann hevur rættiliga krút í gaggunum, tí hann hevur skotið fýra mál í teimum fyrstu trimum dystunum. Undan dystinum ímóti Brønshøj helt veddingarfyritøkan Nordicbet, at Brønshøj var stórur favorittur til at vinna dystin, meðan føroyska útisetaliðið vildi tað øðrvísi.



## Símun skoraði undan tapi

Íslendska felagið Keflavík spældi undan vikuskiftinum steypadyst ímóti FH, sum er íslendskur meistari, og tað endaði við 3-2 tapi. Keflavík kom aftur um 3-0, áðrenn teir royndu at venda dystinum. Vágbingurin Símun Samuelsen setti gongd á liðið hjá Keflavík við einum máli til 3-1. Løtu seinni minkaði Keflavík til 3-2, men nærri komu teir ikki. Næsta vikuskiftið byrjar íslendska landskappingin, og tá sleppur Símun Samuelsen av álvara at royna seg í týðandi dysti aftur.

### STUTT SAGT

## Jákup ivasamur til Pólandsferð

Stóran part av seinna hálvleiki var Jákup Mikkelsen ikki nógv meira enn hálvur í B36-málinum. Øll málspørt vórðu hesa løtuna tikin av Klæmint Matras, eins og talan bert gjørdist um tað eina útsparkið – við vinstra! – seinasta hálva tíman.

– Eg fekk ein skaða í lærkrikan, og so var tað best at taka tað róligt.

Men longu mikudagin er dystur aftur, umframt at landsliðið skal avstað beint eftir hetta. Verður tú tøkur til hesar dystirnar?

– Tað veit eg ikki. Mána- og týsdagin taki eg mær so av løttum, og so mugu vit síggja, hvussu leikur annars fer. Men verður tað ikki betri, enn tað er í løtuni, so er ikki hugsingur um at spæla, segði Jákup Mikkelsen eftir dystin sunnudagin.

**-mørk**

## Johan breyt nøsina

Tað tókst ikki av nógvum, tá ein lítil samanbrestu á miðvøllinum sendi Johan V. Gunnarsson hjá B36 í gólvið. Saman við Ronnie Samuelsen fór hann upp í luftdyst, tá høvdini bóru saman.

Johan gekk sjálvur út av vøllinum, har tað skjótt varð staðfest, at nøsin var brotin. Lækni var hjástaddur, og alt fyri eitt varð brotið sett upp á pláss, men ein eftirfylgjandi vitjan á skaðastovuna og røntgendeildina slapst tó ikki undan.

Avloysarin hjá Johan var annar tvíbura-beiggin, Ásbjørn. Ein útskifting, sum skapti eina heldur ørkymlandi støðu hjá dómaranum, sum at byrja við ikki varnaðist, at talan var um útskifting. Hann helt, at sami maður kom aftur á vøllin. **-mørk**

B36-EB/Streymur 2-2 (2-1):

# Oddaliðið helt um sessin

*B36*

*EB/S*

**Við stórum mannfalli var talan nærum um unglingalið hjá B36, men sama unga liðið átti so ruddiliga annað stigið uppiborið, tá oddaliðið var á vitjan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað mundu vera fleiri av B36-viðhaldsfólkunum, sum stúrsaðu nakað við, tá Petur Reinert í fagrasta várveðrið blásti dystin í Havn ígongd.

Mannfallið í B36 hevur verið hampuliga stórt seinastu tíðina, og fram um nakað, sum skuldi breiddin í hópinum hjá B36 standa sína roynd sunnudagin. Og tað kom eisini til sjóndar við nøkrum taktiskum rokeringum, har tað ikki minst tóktist ein djørv avgerð at lata 17 ára John Hansen spæla sín fyrsta dyst á besta B36-liðnum mitt í brennideplinum á miðvøllinum.

### Mikkjal í essinum

Hóast truplu fortreytirnar, so stóð tó hampuliga skjótt greitt, at B36 so avgjørt eisini hevði sínar ætlanir við dystinum.

Gestirnir, ið mest sum hava verið flúgvandi í ár, spældu í eyðkenda kontra-stílinum, har Sorin Anghel var einsamallur á toppinum, men har tríggir framrættaðir miðvallarar vóru skjótir at stuðla. Á miðvøllinum arbeiddu Ronnie og Bárður hart og væl, soleiðis at annars stinna verjan ikki kom undir nakað serligt trýst.

Uppskriftin var eyðsýnt, at tað skuldi ganga skjótt fyri seg, tá B36 misti bóltin, men tað gekst tó illa at revsa slík mistøk. Fyrst og fremst, tí vertirnir rættiliga tilvitað ansaðu eftir, at slík mistøk ikki vórðu framd. Men eisini tí Mikkjal Thomassen á B36-miðvøllinum so ruddiliga átók sær ábyrgdina sum tann, ið skuldi stýra spælinum. Óteljandi ferðirnar var hann maðurin, sum stýrdi bæði ferð og kós á álopunum, samstundis sum hann dugdi væl at halda hóskandi dýpdina í miðvøllinum. Hetta so hesin mest sum ongan tíð varð yvirspældur, tá gestirnir royndu at kontra.

Júst leikluturin, sum Mikkjal hesa ferð tók á seg, hevur kanska verið ein tann størsti mangulin í spælinum hjá B36 í ár. Og hann var í øllum førum ein av høvuðsorsøkunum til, at B36 fekk eitt veruligt tak á dystinum sunnudagin.

### Hanus við í tí mesta

Tað gekk tó heldur striltið at skapa teir heilt opnu møguleikarnar, men fleiri ferðir var talan um vandamikil innlegg. Og tí var tað á ongan hátt óuppiborið, tá B36 legði seg framum, tó at málið kom nakað óvæntað. Í øllum førum varð Rene Tórgarð tikin púrasta á bóli, tá Hanus Thorleifsson av brotsteigarhorninum smekkaði til móti nærra stólpanum, og so stóð 1-0.

Tað var tó ikki liðugt við teimum løgnu málunum. B36 helt áhaldandi eitt gott tak um dystin, men bara 10 minuttir seinni var aftur javnvág í málroknskapinum. Eitt langt innkast varð tveitt inn í brotsteigin hjá B36. Bárður H. Joensen royndi at stúta burtur, men hann fekk bara longt bóltin aftur um seg, soleiðis at ein púra sakarsleysur Jákup



*Fyri tað nógva høvdu Klæmint Matras og B36-verjan eitt sera gott tak á Rafael Kwiecinski og hinum*

Mikkelsen ikki fekk gjørt annað enn at staðfesta, at bólturin endaði í málinum. Og tá Sorin Anghel í næsta álopinum smekkaði til á stongina, kom veruliga lív í alsamt vaksandi áskoðarafjøldina hjá gestunum.

Hetta kundi kanska tikið nakað av luftini úr partvíst óroyndu manningini hjá